## Blaðútgáva steðgað

Amerikanska blaðið Boston Now, sum kom út í býnum Boston, og sum íslendska fyritøkan Baugur Group stovnaði ígjøgnum dóttirfelagið Dagsbrún Media fyri einum ári síðani, er selt. Tað er blaðleiðslan, sum hevur keypt, og hon hevur valt at steðga útgávuni. Á heimasíðuni sigur leiðslan, at búskaparviðurskiftini í Íslandi eru orsøkin til, at blaðið er steðgað, men hvussu tey ávirka blaðið aftan á eigaraskiftið verður einki sagt um.



## Diamantur í dustsúgvaraposa

Tað er rættiliga sannlíkt, at eigarin av eini bilvaskistøð í St. Petersborg í Russlandi frameftir fer at biðja starvsfólkið hjá sær rysta posan eyka væl, tá dustsúgvaraposin skal tømast, eftir at ein diamanthálsketa varð funnin í dustinum. Virðið á hálsketuni er 2,4 milliónir krónur. Eftir at hava funnið hálsketuna sendi eigarin, Vladimir Shapiro, boð eftir einum serfrøðingi sum kundi upplýsa virðið á hálsketuni. Ovfarni bilvaskaeigarin heldur, at man mátti uppdaga tað, um ein misti nakað slíkt, skrivar bt.dk

# Nýggjur føroyskur miðlarisi

**Við keypinum av Vinnuvitan og Vikublaðnum er Dimmalætting vorðin ein rættiligur risi í føroyska miðlaheiminum.**
**– Hetta verður eingin løtt uppgáva, men kortini ein uppgáva, sum kann loysast, sigur Árni Gregersen, sum er stjóri fyri øll trý bløðini**

BLAÐKEYP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur verið merkiliga lítið at hoyrt til samanrenningina millum Dimmalætting øðrumegin og Vinnuvitan og Vikublaðið hinumegin. Hetta hóast samráðingar eru farnar fram í einar fimm til seks vikur.

Við keypinum fer Dimmalætting samtakið fram um Miðlahúsið í tali av starvsfólkum. Tilsamans verða tey um 60.

- Men ætlanin er við tíðini at »trimma stabin«, serliga tá talan er um marknaðardeildina og grafiska økið. Vit hava nøkur ung fólk har, sum fara víðari, og tey størvini verða ikki øll endursett, sigur Árni Gregersen, stjóri.

Hann sær samanrenningina sum eina spennandi avbjóðing, men kortini ikki sum nakra lætta uppgávu.

- Tað verður neyðugt at rætta upp fíggjarliga, og tað verður ikki nøkur løtt uppgáva. Men hinvegin heldur ikki ein uppgáva, sum ikki kann loysast, sigur Árni Gregersen.

Sambært stjóranum verður tað ein fyrimunur hjá samlaðu fyritøkuni, at teir nú hava eitt dagblað, eitt serblað og eitt lýsingarblað. Hann heldur ikki, at bløðini fara at »stjala« frá hvørjum øðrum.

- Eg síggi tað hinvegin sum ein fyrimun, at kundin nú verður uppringdur av bert einum seljara heldur enn fleiri, sigur Árni Gregersen.

### Atskildar redaktiónir

Hóast staburin við tíðini skal trimmast, verður eingin uppsagdur, og teir fýra undanfarnu eigararnir halda allir fram í fyritøkuni.

Konseptið fer eisini at halda fram óbroytt, og talan verður um púra atskildar redaktiónir.

- Blaðfólkini verða ikki skift millum redaktiónirnar, tað fer at koyra, sum tað gjørdi framman undan. Men sjálvandi ber til at flyta fólk millum bløðini um so er, at tey koyra troytt. Men tá verður talan um longri tíðarskeið, og ikki bert til stakar uppgávur, sigur stjórin á samtakinum.

Í heila taki verða tey trý bløðini rikin eins og framman undan.

- Prentmiðstøðin byggir í løtuni ein bygning, sum ætlanin er at flyta inn í um eitt ár ella so. Tá verður so parturin, har teir halda til í løtuni, innrættaður til redaktión, og tá verða øll bløðini savnað her á Dimmalætting, sigur Árni Gregersen.

Vikublaðið verður framvegis prentað í Danmark, tí sambært Árna Gregersen er ikki møguleiki at prenta á Prentmiðstøðini sum er.

- Men tá hon flytir í nýggj hølir, fær hon eitt prenttorn aftrat og eina maskinu at leggja inn í við, sigur stjórin á Dimmalætting.

Orsøkin til, at Dimmalætting nú hevur valt at keypa Vinnuvitan og Vikublaðið eru í høvuðsheitinum tvinnar.

- Tey bæði bløðini høvdu brúk fyri einari størri organisatión; og so hava vit keypt, tí vit ætla okkum at vaksa, sigur Árni Gregersen, sum við keypinum nú er vorðin stjóri fyri umleið 60 starvsfólkum í mun til tey gott 30, sum starvast á Dimmalætting.



*Árni Gregersen er nú stjóri á trimum bløðum, Dimmalætting, Vinnuvitan og Vikublaðnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

tá hann keypti partabrøvini í P/F Atlanskolvetni úr kreppurakta felagnum P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, rindaði fyri partabrøvini.

Tað framgongur ikki greitt hvussu flytingin millum P/F Kongshavnar Útgerðarfelag og privatpersónin Tórbjørn Jacobsen er farin fram, bert at partabrøvini eru seld fyri áljóðandi.

Hetta eru viðurskiftir sum eru løtt at kanna, og er tað sera umráðandi at hetta verður gjørt, so ongin illgruni er um, at aðrir kravánarar hava verið betur stillaðir enn landskassin.

Spurningurin um gegni hevur eisini verið frammið, bæði viðvíkjandi teimum sum hava kannað málið fyri løgmann; viðvíkjandi Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni, og viðvíkjandi øllum landsstýrinum, sum Tórbjørn Jacobsen er partur av.

### Gegnisspurningurin

Fyrisitingarlógin ásetur, at persónar, sum hava ávíst tilknýti til eitt mál, eru ógegnigir til at viðgera málið. Tí undrar tað ikki sørt, at løgmaður hevur valt Jógvan Amonsson sum ein teirra, sum kannaði viðurskiftini kring Tórbjørn Jacobsen, tá sami Jógvan Amonsson, sum ríkisgóðkendur grannskoðari, er grannskoðari hjá P/F Atlantskolvetni og hevði ein týðandi leiklut í framløguni av prospektinum fyri P/F Atlanskolvetni, har Tórbjørn Jacobsen, fyrst sum stjóri og parteigari í P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, var parteigari, og síðan privatpersóninum Tórbjørn Jacobsen.

Tá Tórbjørn Jacobsen í eini roynd at flyta áhugan frá málinum, almannakunngjørdi sínar privatu ognir, kom fram, at P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, eigur týðandi ognir í P/F Dagsbrún, sum er ein av høvuðsaktørunum í føroysku tilfongisvinnuni.

Tí kann spurnartekin setast við um Tórbjørn Jacobsen er gegnigur at sita sum landsstýrismaður við fiski- og tilfongismálum. Eisini tí hann eigur partabrøv í P/F Atlanskolvetni.

Tað er sera umráðandi at privat áhugamál og politikkur verða hildin hvørt frá øðrum. Bara tað at spurnartekin kann setast við slík viðurskiftir, kann verða við til at máa álitið undan teirri politisku skipanini.

Í grannalondunum hava vit sæð, at ráðharrar, sum hava havt privat áhugamál innan greinar, sum koma undir teirra málsøkið, hava verið noyddir at sleppa sær av við privatu partabrøvini.

Tað var ikki av ongum, at starvsfólkini í táverandi Oljumálaráðnum vóru biðin um ikki at keypa partabrøv í P/F Atlanskolvetni, tí tá kundi spurnartekin setast við gegnið hjá Oljumálaráðnum.

### Álit á politisku skipanina

Tað kann eisini setast spurnartekin við, um landsstýrið, sum Tórbjørn Jacobsen er partur av, hevur gegni til at viðgera umsóknina frá P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, um at sleppa at flyta landskassaskuldina á góðar 41 milliónir krónur yvir á annað skip.

Vit hava jú sæð, sum greitt er frá frammanfyri, hvussu tvey av landsins hægstu embætisfólkum, saman við løgmanni, hava mett um partabrævahandilin millum Tórbjørn Jacobsen og P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, uttan at viðgera týðandi viðurskiftir hesum viðvíkjandi.

Hóast tað er trupult at ímynda sær, at ein slík umsókn kann verða gingin á møti og at tað er at undrast yvir, at hon er send landsstýrinum, skal hon hava eina sakliga viðgerð.

Ein sera prinsipiellur spurningur er skuldin hjá P/F Kongshavnar Útgerðarfelag á 41.435.000,62 kr. til landskassan.

At løgmaður í umrødda uppriti tilonkisger skuldina, sum stavar frá stuðulsláni í fiskifarinum Napoleon, givið við heimild í løgtingslóg, er átaluvert.

Her er talan um pengar hjá landskassanum, skattaborgarans pengar, sum Føroya Løgting, hevur sæð sera álvarsamt uppá, tá ymisk viðurskiftir viðvíkjandi stuðulslánunum hava verið til viðgerðar Vit hava áður sæð, at persónar, sum eru útnevndir ella valdir til landsstýrismann, hava verið noyddir at greiða alla skuld til landskassan, áðrenn teir hava tikið við starvinum.

Hetta er eisini siðvenjan í londunum kring okkum, lond sum vit fegin vilja samanbera okkum við. Har hevði tað als ikki komið uppá tal, at ein persónur, hvørs privata felag skyldaði tí almenna 41.435.000,62 kr. var útnevndur til ráðharra í landsins stjórn.

Henda siðvenjan er grunda á, at borgarin skal hava álit á teirri politisku skipanini og skal føla seg tryggan við tær avgerðir, sum verða tiknar av landsins stjórn.

Hetta er onki minni enn grundarlagið undir rættarsamfelagnum.

Tí má løgmaður, sum hevur evstu ábyrgd, greiða løgtinginum og Føroya fólki frá, hví hann setur hesa sera týðandi siðvenju til viks, nakað sum ikki hevði komið fyri í okkara grannalondum, og framhaldandi letur Tórbjørn Jacobsen sita sum ráðharra í landsins stjórn.«